EIN UPPGERÐ

stuttsøga av Anton Tjekhov

Framhald av síðu 20

Fedosia Vasiljevna kundi ikki tola rættir, hon ikki sjálv hevði biðið um; illa særd, um at gráta.

– Nú mugu vit ikki øsa okkum, segði húslæknin, Mamikov doktari, sum sat undir liðini á henni, við blíðligari rødd og legði hondina á hennara arm. Hann smíltist vinarliga.

– Vit mugu eira okkara smáu nervar. Halda uppat við at hugsa um hasa brosjuna! Ein góð heilsa hevur meira virði enn hasar lúsa 2000 rublarnir.

– Hvat leggi eg í hasar 2000! segði frúan og fekk eitt stórt tár í eygað. – Tað er sjálv gerðin, sum øsir meg upp! Eg toli ikki ein tjóv í mínum húsi. Hvat leggi eg í pening, sigi eg; men at stjala frá mær – tað er svartasta ótakksemi! Tað er altso tøkkin fyri mína góðgerð ...

Øll hugdu niður á tallerkin; men Masjenka helt, at øll hugdu at sær. Hálsurin snørdi seg saman, hon skar útúr at gráta, og goymdi seg við lummaklæði upp fyri andlitið.

– *Pardon*, mutlaði hon. – Eg havi tað ikki gott. Eg havi høvuðpínu. Eg fari upp á mítt kamar.

Hon rendi stólin frá sær, reisti seg og var sera kedd av larminum, hetta gjørdi. Hon var heilt reyð í høvdinum, tá ið hon næstan rann út úr matstovuni.

– Tað er synd og skomm! Segði Nikolaj Sergejitj hálvhart og sá ræðuliga keddur út. – Áttu vit ikki givið hennara kamar frið! Tað var so ... malplacerað.

– Eg sigi ikki, at hon hevur tikið brosjuna, segði Fedosia Vasiljevna. – Men kann tú lata hatta um teg ganga? Eg má siga, at eg líti ikki á tær kloddafínu ungfrúurnar.

– Tað er so malplacerað, tað tú sigur, Fenja ... tú mást orsaka meg, Fenja, men eftir lógini hevur tú ikki rætt til at fremja húsarannsókn.

– Eg blási uppá tína lóg og rætt! Eg haldi meg til hetta eina: mín brosja er burtur! Tað er nóg mikið fyri meg! Og eg skal nokk finna hana! Hon slóg gaffilin á tallerkin, og hennara eygu vóru logandi. – Passa tú tín mat og legg teg ikki uppí míni mál!

Nikolaj Sergejitj hugdi eyðmýkt niður og suffaði.

Masjenka tveitti seg á seingina, beint sum hon kom inn á kamarið. Í løtuni kendi hon hvørki angist ella skomm, einans eina brennandi trongd til at fara niðurundir og geva hasum býtta, hástóra kvendinum nakrar lúsingar. Men hon tordi ikki.

Hon lá við andlitinum trýst í koddanum og ímyndaði sær, hvussu hon hevði frøtt seg við at keypt eina sera virðismikla brosju og tveitt hana í andlitið á hasari innbilsku skrindini. Ella at Fedosia Vasiljevna misti alt, hon átti, og noyddist at bidda mat. Oh, tá hevði verið stuttligt at givið henni eina olmussu! Ella hugsa sær, um hon, Masjenka, óvæntað hevði arvað nógvan pening, so hon kundi keypt sær afturlatnan vogn við hestum og koyrt í glansi og dýrd fram við vindeygunum hjá kvendinum. Sum hon hevði øvundað sínari fyrrverandi lærarinnu!

Men alt hetta var einans dreymamyndir; í veruleikanum hevði hon bert eitt at gera – rýma skjótast gjørligt; hon vildi ikki vera ein tíma aftrat í hesum húsi! Gaman í ørskaðist hon við hugsanini um aftur einki arbeiði at hava og at verða noydd at fara heim til síni fátøku foreldur; men hvat skuldi hon gera? Masjenka orkaði ikki sjónina av sínari frúu, av sínum lítla kamari; hon hevði so nógva andstygd fyri Fedosiu Vasiljevna og hennara heilaspunasjúkum og uppgjørdum stoltleika, at hon helt, at lívið var ótolandi, einans tí hendan kvinnan var til. Masjenka leyp niður frá seingini og fór at pakka fjálturstungin.

– Loyva tygum mær inn? hoyrdi hon røddina hjá Nikolaj Sergejitj uttanfyri; hann hevði gingið seg varliga til dyrnar og tosaði við teskandi og sleikjandi rødd. Kann eg koma?

– Gerið so væl kom innar.

Hann kom innar, men varð standandi í durunum. Eyguni vóru dølsk, og hansara lítla reyða nøs skygdi. Hann hevði drukkið øl omaná matin, og tað kundi síggjast á gongulagnum og ristandi hondum.

– Hvat er hetta? spurdi hann og peikaði á ta hálvfullu kurvina.

– Ájú, eg eri farin at pakka. Tygum mugu orsaka meg, Nikolaj Sergejitj, men eg kann ikki búgva í tygara heimi. Tað er sera ærumeiðandi fyri meg, tað, sum er hent.

– Tað skilji eg ... Men hvat nyttar tað? ... Ja, tað var ikki beint at rannsaka tygara ognir ... Men tú átti ikki at lagt í, verður tú minni av hesum?

Masjenka svaraði ikki og helt fram við at pakka. Nicolaj Sergejitj dró hugsanarsamur í tað ótætta yvirskeggið og segði smikrandi: – Eg skilji tygum so inniliga væl, men tygum mugu fyrigeva konu mínari. Tygum vita jú, at hon er nervaveik; hon er spilt og órímilig, men tygum mugu ikki døma hana ov hart ...

Masjenka svaraði framvegis ikki.

– Um tygum kenna tygum so álvarsliga vanvirdan, sum tygum eru, helt Nikolaj Sergejitj, – so eri eg til reiðar at biðja tygum um umbering. Fyrigevið mær.

Masjenka svaraði als ikki og helt fram við at pakka. Hatta karakterveika, kúgaða menniskja hevði avgjørt einki at siga í sínum egna heimi. Hansara leiklutur er neyðarsligur snultari, sum smokkar burturímillum húskallar; hansara umbering hevur onga tyngd.

– Hm ... tygum siga einki? Tygum nøktast ikki? Um so er, biði eg, vegna konu míni ... Eg viðurkenni, at hon hevur borið seg óumhugsað ... Eg má sum aðalsmaður ...

Nikolaj Sergejitj suffaði og helt fram:

– Tygum vilja afturat hava, at at eg skal hava samvitskubit ... tygum vilja síggja mítt hjarta níta seg ...

– Eg veit, tygum ikki kunnu gera við tað, Nikolaj Sergejitj, segði Masjenka grátin. – Hví skulu tygum plága tygum við hesum?

– Nei ... Men góða tygum ... farið ikki ... Eg biði tygum ...

Men Masjenka ristí við høvdinum. Nikolaj Sergejitj fór til vindeygað og trummaði við fingrunum á rútin.

– Tygum vita ikki, hvussu slíkar miskiljingar pína meg, segði hann. – Vilja tygum hava, at eg á mínum knøum skal biðja tygum um fyrigeving? Tygara stoltleiki er sáraður, tygum hava grátið, tygum vilja flíggja yvir háls og herðar; men minst til, at eisini eg havi stoltleika, men tað hugsa tygum eftir øllum at døma ikki um. Ella vilja tygum hava, at eg skal siga tygum nakað, sum eg avgjørt ikki hevði boðað frá í einum skriftamáli? Skal eg siga tygum tað? Skal eg viðganga nakað, sum eg á mínum deyðastrá ikki vildi likið?

Masjenka svaraði ikki.

– Tað eri eg, sum havi stolið brosjuna hjá konu mínari! segði Nikolaj Sergejitj snávandi skjótt. – Eru tygum nú nøgd? Hava tygum so fingið nóg mikla uppreising? Ja ... tað var eg ... Men eg líti á, at tygum ikki opinbera loyndarmálið ... Í Jesu navni, smetta meg ikki fyri nakran!

Masjenka gjørdist forfard og skelkað, men helt fram við at pakka, eins og hon einki hevði hoyrt; hon nápaði tingini, krámaði tey orógvað og stappaði tey við ongum skili í kuffertið og kurvina. Júst nú, eftir hansara treytaleysu játtan, var hon ikki før fyri at verða eina løtu afturat i hesum húsi; hon skilti ikki, at hon hevði orkað at verið her í allari hesari tíð.

– Tygum skulu ikki undrast ... segði Nikolaj Sergejitj eftir eini lítlari løtu. – Tað er ein heilt vanlig søga! Eg krevji pening, men hon gevur mær ikki ein kopèk. Og tað er mítt hús, og ríkidømið átti pápi mín. Masjenka, veruliga eigi eg alt, og brosjuna átti mamma mín, og alt, sum er her í húsinum, alt er ... mítt! Men hon hevur klórað, gnaddað alt til sín! ... Skal eg so hava rættarmál móti mínari konu? ... Eg biði tygum so inniliga, fyrigevið mær ... og rímið ikki. **Tout comprendre, tout pardonner.**

[At skilja alt, er at fyrigeva alt]. Halda tygum so fram hjá okkum?

– Nei! rópti Masjenka. Hon risti á kroppinum. Lat meg vera, sigi eg tygum!

– So, Gud eigi teg ... suffaði Nikolaj Sergejitj og setti seg á ein skammil við síðuna av kuffertinum. – Eg má siga, at eg havi veikleika fyri teimum, sum enn eru før fyri at hava andstygd fyri tí, sum sárar tey. Eg virði tey, sum kunnu gerast ill. Eg vil hámeta tygum allar mínar dagar ... Tygum ríma altso? Eg skilji ... Tað kann ikki vera ... eigur ikki vera øðrvísi ... Sjálvsagt ... Tygum eru lukkulig, tygum kunnu gera tygum frøls, men eg – á Harra gud! Ikki longri enn boðini røkka! Eg sleppi ikki eitt fótafet uttanfyri hesum fongsli! Eg sleppi ikki av landinum at ríma frá øllum. Og har sita so neytini hjá konu mínari: góðsstjórnin, virkisleiðarin, Gud viti hvat ... Fanin taki tey! Tey veðseta góðsið yvir skorsteinarnar! ... Eg sleppi ikki so frætt sum við tráðu oman á ánna ella bara nerta nakað á mínari ogn.

– Nikolaj Sergejitj! hoyrdist tann vreiða røddin frá stovuni. – Agnia! Rópa eftir harranum!

– Kann eg ikki fáa tygum at vera? Spurdi Nikolaj Sergejitj, sum skundaði sær yvir móti hurðini. – Áh, bara um tygum kunnu vera verandi! Eg skal kom til tygara um kvøldarnar og ... fáa eitt prát við tygum. Áh hvat? Far ikki. Tá ið tygum eru farin, er einki menniskja eftir her heima. Tað er ræðuligt at hugsa!

Hansara andlitið var inniliga, bønandi, pínt, men Masjenka risti avgjørd á høvdinum, og fór úr kamarinum við einum undanførandi handabrái.

Ein hálvan tíma seinni fór hon úr húsinum.

ooo

Í smædni ella ósmædni hevur undirritaði roynt at umseta úr donskum hesa hjartanemandi stuttsøguna "Ein uppgerð," sum Tjekhov skrivaði 26 ára gamal.

Heri Mohr